# Sinnaðir at stovna eini 100 almenn arbeiðspláss í Suðuroy

**– Taka suðuroyingar av tilboðnum frá Landsstýrinum, verður beinanvegin farið undir at byggja skúladepil í Hovi og røktarheim í Vági. Bara á røktarheimin-um verða eini 100 almenn arbeiðspláss**

SUÐUROYAPAKKI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Almenn arbeiðspláss til eini 100 fólk!

Tað er tilboðið, sum landsstýrið hevði við sær í skjáttuni til Suðuroyar týsdagin.

Løgmaður og landsstýrismaðurin í skúlamálum og landsstýrismaðurin í almannamálum vóru týsdagin í Suðuroy og høvdu fund við øll bý- og bygdaráðini í oynni um framtíðina.

Ætlanin hevur verið at byggja miðnámsskúla í Vági nú og at byggja heilsuskúla á Tvøroyri seinni. Men tað sum landsstýrið nú roynir at sannføra suðuroyingar um, er, at tað er klókari at byggja ein skúladepil í Hovi við bæði miðnámsskúla og heilsuskúla. Afturfyri er landsstýrið sinnað at byggja eitt røktarheim á stykkinum, sum er grivið út fyri studentaskúlanum í Vági.

Og týsdagin vóru Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almannamálum, Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í skúlamálum og Jóannes Eidesgaard, løgmaður í Suðuroy og greiddu frá tilboðnum.

Landsstýrið hevur ongantíð dult fyri, at talan er um eitt samlað tilboð til suðuroyingar, ein suðuroyarpakka, sum hevur tvey endamál: Í fyrru atløgu er endamálið at nøkta tørvin á skúlum og tørvin á røktarheimsplássum.

Men endamálið er eisini at skapa nøkur almenn arbeiðspláss í Suðuroy, sum allir serfrøðingar hava staðfest at tað er stórur tørvur á – helst størv til konufólk.



– Soleiðis hugsa arkitektarnir sær at eitt røktarheim kann síggja út á stykkinum, sum er grivið út til miðnámsskúlan í Vági

### 100 almenn arbeiðspláss

Landstýrið greiddi suðuroyingum frá, at tørvur er á 49 stovnsplássum til eldri og sjúk í Suðuroy.

Higartil hevur talan verið um at byggja eitt røktarheim í Vági til 35 fólk, men á fundinum týsdagin fingu suðuroyingar at vita, at landsstýrið er sinnað at byggja ein samansettan stovn við røktarheimi, umframt við plássum til minnisveik og til sinnisveik við tilsamans 49 plássum.

Á einum slíkum stovni verða 65 heil størv. Men av tí, at hetta er ein vinnugrein, har tað er heilt vanligt at arbeiða hálva tíð og 3/4 tíð, verður mett, at talan sostatt verðum um eini 100 arbeiðspláss.

Tilsamans fer ein slíkur stovnur at betala starvsfólki einar 20 milliónir krónur í lønum um árið.

Men harafturat kemur so alt tað avleidda virksemi í ein slíkur stovnur kastar av sær, tí hann hevur stóran tørv á vørum og tænastum av øllum handa slagi, sum eisini verða keyptar úr nærumhvørvinum.

Tann stóri spurningurin hevur verið, hvussu kommunurnar skulu megna at fíggja sín part av eini slíkari bygging.

Kommunurnar skulu betala helvtina av byggikostnaðinum og landið betalir hina helvtina.Hinvegin betalir landið allan raksturin.
Landsstýrið er ikki sinnað at víkja frá regluni um, at kommunurnar skulu betala hlevtina. Men Landsstýrið er sinnað at finna eitt fíggingarmynstur so at allar kommunurnar kunnu vera við. Eitt nú kann talan vera um avdráttarskáa og longda avdráttartíð.
Við sær til Suðuroyar hevði landsstýrið eisini eitt modell av, hvussu eitt røktarheim kann koma at síggja út á stykkinum, sum er grivið út í Vági til miðnámsskúlan.
Annars hevur verið ført fram, at skúlin í Vági hevur so serligt byggisnið, at ongin annar bygningur kann setast á stykkið.
Men nú hava arkitektarnir, sum teknaðu skúlan gjørt eitt modell, sum vísur, hvussu eitt røktarheim kann setast á sama stykki.

# Fara til verka beinanveg

SUÐUROYARPAKKI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Taka suðuroyingar av tilboðnum frá landsstýrinum um at byggja Røktarheim í Vági, verður farið til verka beinanvegin.

Tað staðfestir Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanamálum.

Hann sigur, at á fundinum við suðuroyingar týsdagin, fekk landsstýrið lýst málið fyri kommununum í Suðuroy.

Eftir fundin skulu kommunurnar so viðgera støðuna og koma til eina niðurstøðu.

Men av tí, at tað eru kommunurnar, sum skulu taka stig til at byggja røktarheim og sum skulu betala helvtina, verður neyðugt, at kommunurnar koma til eina felags niðurstøðu.

Hans Pauli Strøm sigur eisini, at kommunurnar mugu bera hampiliga skjótt at so at landsstýrið kann taka støðu nakað skjótt, so at greiða fæst á um tað verður egg ella ungi.

Í løtuni liggur bólturin sostatt hjá kommununum í Suðuroynni.

Hans Pauli Strøm sigur, at summar kommunur boðaðu beinanvegin frá, at tær tóku undir við ætlanini. Onkur kommuna var eitt sindur ivingarsom og onkur kommuna beinleiðis vísti málið frá sær.

Landsstýrismaðurin vil ikki siga, hvørja støðu tær einstøku kommunurnar høvdu. Men tað, vit hava fingið upplýst frá fundarfólki, er, at fýra av teimum smærru kommunurnar í oynni boðaðu greitt frá, at tær taka undir við ætlanini. Tann fimta lítla kommunan, Fámjin, hevur ikki tikið støðu. Tvøroyrar Kommuna er meiri ivingarsom, men vágbingar vísa tilboðnum frá sær, tí teir halda framvegis fast við, at miðnámsskúlin skal byggjast í Vági, soleiðis sum ætlað.

### Fíggingin er ikki trupulleikin

Ein høvuðstrupulleiki er, hvussu eitt slíkt røktarheim skal fíggjast, tí summar kommunur í Suðuroy er rættiliga illa fyri.

Men Hans Pauli Strøm sigur, at á fundinum týsdagin fekk Landsstýrið greitt kommununum frá, at fíggingin skal ikki verða nakar trupulleiki.

– Kommunurnar skulu betala 50% av byggingini og vit hava boðað kommununum frá, at landsstýrið er sinnað at finna ein fíggingarleist so at allar kommunurnar kunnu vera við.

Talan kann vera um at toyggja avdráttartíðina og at geva kommununum ein avdráttarskáa.

– Fíggingin verður ikki ein trupulleiki. Trupulleikin hjá kommununum er heldur av prinsipiellum slagi og hann er um ætlanin, sum er skorin út í kortið við miðnámsskúla í Vági og heilsuskúla á Tvøroyri, skal broytast.

Eitt annað ivamál hevur verið, hvørjari tíðarætlan, landsstýrið arbeiðir eftir.

– Har hava vit gjørt greitt, at taka kommunurnar undir við ætlanini, verður farið til verka beinanvegin við at projektera og fyrireika byggingina.

– Taka kommunurnar undir við ætlanini stendur røktarheimið liðugt um góð tvey ár, sigur Hans Pauli Strøm

Tað hevur eisini fleiri ferðir verið reistur spurningur við um hetta er eitt mál, sum øll samgongan stendur aftanfyri?

Hans Pauli Strøm staðfestir, at hetta er eitt mál, sum samgongan stendur aftanfyri. Ella sum hann málber seg:

– Tað er ikki í heimildarloysi at vit eru farin til Suðuroyar við hesum tilboðnum.